*»Vit eru vónbrotin og staðfesta, at viðhvørt stemmar tað ikki«*

*Paul á Krákusteini*

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# ÍTRÓTTUR



*Hóast miðlarnir í turkiska milliónbýnum mest sum mansverja B36-liðið, so tykjast spælararnir ikki órógvaðir av hesum, sigur Kristjan á Neystabø*

# Løgreglan stendur klár fyri B36

**Hóast mótstøðuliðið í annaðkvøld telist millum tey heilt stóru í Europa, so royna teir í B36 at taka avbjóðingina sum eina uppliving**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Skuldi tað hent seg, at B36 kemur hampuliga heilskapað úr dystinum í Istanbul í annaðkvøld, so stendur eitt heilt herlið av løgreglufólki til reiðar at hjálpa føroyska ferðalagnum av stadion.

Tað er ein av veruleikunum, sum, spælarar og leiðarar hjá B36 royna at venja seg við, nú teir gera seg út til helst størstu uppgávuna, sum nakað føroyskt lið hevur havt. Móti einum av teimum feløgum, sum standa til reiðar at koma upp sonevnda G-14 samstarvið, sum er eitt samtak av veruligu risunum í Europeiskum fótbólti. Eitt samtak, sum í verandi líki telur lið sum Real Madrid, Manchester United og Bayern München.

Og tá hópurin telur fleiri av teimum, sum fyri fýra árum síðani vunnu HM-bronsu, umframt bæði franskar og brasilskar landsliðskandidatar, stendur teimum flestu greitt, at talan er um óvanlgia sterka mótstøðu.

### Mansvardir av miðlunum

B36 var eisini í 1999 á vitjan í Turkalandi, tá teir spældu UEFA-Cup dyst móti Ankaragucu. Í dag er eingin av spælarunum frá teirri ferðini við í hópinum, men venjarin, Sigfríður S. Clementsen, var tá millum spælararnar, eins og Kristjan á Neystabø eisini ta ferðina var leiðari hjá hópinum.

Men upplivingin í 1999 kann als ikki sammetast við tað, sum B36 upplivir í hesum døgum, sigur Kristjan á Neystabø.

– Vit høvdu nokk ikki ánilsi fyri, hvussu stórt hetta felagið er, áðrenn vit komu til Istanbul. Hvørja einastu venjing eru hópur av mynda- og tíðindafólki og hyggja at okkum, og sjónvarpsstøðir fylgja mest sum hvørjari rørslu hjá okkum. Felagið hevur eisini egna sjónvarpsrás, og teir vóru í hølunum, tá vit í gjár vóru á ferð runt í Istanbul.

– So tað eru nógv viðurskifti, sum vit als ikki eru vanir við, sum gera seg galandi, men tað tænir spælarunum til rós, at teir als ikki tykjast nervaðir av hesum. Nú síggi eg sjálvandi ikki, hvat fyriferst í tonkunum hjá teimum, men tað tykist, sum taka teir hetta sum eina velduga uppliving.

### Skilja ikki avrikini

Tá tosað verður um føroysku útlitini, sigur Kristjan, at hjá teimum er setningurin greiður. Verjuskipanin skal rigga optimalt, og so er at vóna, at spælararnir hóra undan trýstinum.

Og hóast turkiska stórfelagið er risa-stórur favorittur undan uppgávuni, so er ikki sørt, at lokalu miðlarnir hóast alt eru eitt sindur imponeraðir av B36.

– Tað sigur teimum kanska ikki so nógv, at vit í fjør vunnu á ÍBV, og at vit í ár hava bast maltesisku meistarunum. Tey siga, at tey kenna støðið á føroyskum fótbólti, og tí ivast tey ikki í, at Fenerbache vinnur. Men ein spurningur, sum støðugt verður reistur, er, hvussu vit fyri sjey árum síðani megnaðu at spæla næstan upp til Ankaragucu. Hóast turkiskur fóbtbóltur fyrst og fremst snýr seg um Fenerbache, Galatasary og Trabsponzor, so er tað eitt avrik, sum veruliga hevur vakt ans. Og megna vit at endurtaka tepra 1-0 tapið frá teirri ferðini, stendur óivað væl til hjá okkum, heldur Kristjan.

### Hitin ikki ræðandi

Vanliga er veðurlagið ein av heilt stóru mótstøðumonnunum, tá føroysk lið ferðast suðureftir, men hóast heitt, so tykist hetta ikki vera heilt so ræðandi hjá B36 hesaferð.

Veðurkortið staðfestir, at hitin í løtuni er um 30 stig, og tá B36 spælir klokkan 21 lokala tíð, verður talan helst um nøkur og tjúgu hitastig.

Síðani sunnudagin hava spælararnir vant tvær ferðir um dagin, og enn hevur hitin ikki darvað, verður sagt úr leguni. Skaðar kenna tey einki til enn, og verður sæð burtur frá leikbannaða Mikkjal Thomassen, eru allir spælarar tøkir til uppgávuna.

**STUTT SAGT**

## Gull til U15-liðið

Tað eydnaðist føroyska U15 landsliðnum í dreingjafótbólti at standa ovastir á skamlinum, tá finalan í Aberdeen International Football Festival varð spæld um vikuskiftið. Hóast Føroyar hava verið fastur partur av kappingini í 12 ár, so er hetta fyrsta ferðin, at eitt føroyskt lið vinnur, so tað var ikki løgið, um bæði spælarar og venjarar vóru ernir á heimferðini.

Finalan varð spæld móti Ross County úr Skotlandi, og tann dystin vunnu Føroyar 2-0. Føroysku málini í dystinum skutu Hallur Hansson og Helgi Samsson.

Til samans spældi føroyska liðið seks dystir á ferðini, og allir seks endaðu við føroyskum sigri. Og við eini samlaðari málúrtøku upp á 41-1 var eingin ivi um, at fleiri av liðunum vóru alt ov veik til hesar dystirnar. Talan var tó eisini um harðar dystir, og serstakliga stóð nógv á í fjórðingsfinaluni, sum føroysku spælararnir akkurát vunnu 1-0 móti liðnum hjá Dundee United.

Føroyingar áttu eisini besta málskjúttan í kappingini, og var hesin Helgi Samson, sum stóð fyri 12 av føroysku málunum.

Venjarar hjá føroyska liðnum á ferðini vóru Eli Hentze og Mathias Davidsen. Álvur Hansen var fysioterapetur, meðan Jákup Simonsen var liðleiðari.

**-mørk**

## Santos til Auxerre

Danska meistaraliðið, FCK, missir í næstum eitt av sínum vandamestu álopskortum. Álvaro Santos, sum seinastu tvey árini hevur verið partur av liðnum, hevur gjørt sáttmála við franska Auxerre, og dysturin hjá FCK móti finska MyPa verður hansara seinasti fyri felagið.

Flemming Østergaard, nevndarformaður, tykist tó ikki vera nervaður av hesum yvirhøvur. Seinnu árini hevur hann bygt FCK upp til at vera avgjørt fíggjarliga sterkasta felagið í Danmark, og hann hevur við miðlarnar sagt, at Ståale Solbakken, venjari, bara skal peika á tann spælaran, sum hann helst vil hava, tá hópurin skal styrkjast.

**-mørk**

## Nú er Platini uppstillaður



Michel Platini hevur seinasta árið framt eitt miðvíst lobby-arbeiði í royndunum at gerast næsti forsetin hjá UEFA. Eitt lobby-arbeiði, sum eisini innibar eina Føroya-vitjan fyri ikki so langari tíð síðani.

Og nú er so alment boðað frá, at Platini fer at bjóða svenska Lennart Johanson av, tá UEFA um ikki so langa tíð fer at hava aðalfund.

Sjálvur hevur 76 ára gamli Johanson sagt, at hann er sinnaður at taka eitt tørn afturat, soleiðis at hann verður 81 ára gamal, tá hansara skeið er runnið, og tí bendir alt á, at talan verður um stríðsval.

Eisini týski Franz Beckenbauer hevur sýnt áhuga fyri sessinum, men nú talan longu er um tveir kandidatar, hevur hann sagt, at eingin orsøk er hjá sær at stilla upp.